Fámjin,  29.04.2024

# Umhvørvisárinsmeting í samband við vatnmylluverkætlan á tarastøðini í Fámjin

Umsókn um góðkenning av umhvørvisárinsmeting: Vernd



## Inngangur

Í samband við at TARI Spf. søkir um loyvi at framleiða ravmagn, søkja vit hervið Umhvørvisstovuna um góðkenning av umhvørvisárinsmeting í samband við ravmagnsframleiðslu, sambært kapittul 4 í Elveitingarlógini, *Meting um árin á umhvørvið.*

TARI Spf. er ein taraalifyritøka, ið framleiðir tara til matna (www.tari.fo) og livandi taraskjól til rognkelsi í laksaaliringum (www.akvanest.fo). Vit hava tvey aliloyvi; eitt á Kaldbaksfirði (AA-02) og eitt á tarastøðini í Fámjin (LA-01).

Taravirksemi á støðini í Fámjin byrjaði á heysti 2021. Støðin er karmur um lívfrøðiliga arbeiðið, ið hevur við gróðurseting og menning av taragrókorni at gera. Vit gróðurseta línur við ymiskum tarasløgum, og flyta síðani sáddu línurnar til víðari vøkstur á Kaldbaksfjørðinum (matframleiðsla) ella í laksaaliringar kring landi (AkvaNest). Til taraframleiðsluna í Fámjin nýta vit sjógv, ið vit pumpa inn á støðina. Sjógvurin verður leiddur ígjøgnum reinsuskipan, áðrenn hann verður latin í tarakørini.

Framtíðarætlanirnar hjá TARA eru at savna alla landframleiðsluna á støðini í Fámjin. Hetta umfatar bæði gróðurseting av línum og víðari virking, tá tarin er liðugtvaksin á fjørðinum. TARI virkar hávirðisproduktir bæði til endabrúkarar og ingrediensproduktir.

Framleiðslan krevur orku, og fyri at røkka bestu marknaðunum, er tað eitt krav, at øll framleiðslulið eru burðardygg. Eitt høvuðsmál í framtíðarætlanunum hjá TARA er at framleiðslan er $CO_2$ neutral. Ein liður í at røkka málinum er at framleiða orku úr varandi keldum.

TARI valdi at staðseta virksemið í Fámjin, tí har vóru møguleikar fyri burðardyggari menning; bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og sosialt. Fámjin varð mett sum ein vælegnað staðseting tí:

**1)** gamla smoltstøðin í bygdini var tøk og mett vælegnað til taraframleiðslu
**2)** góð atgongd til reinan sjógv
**3)** Fámjins Kommuna er samstarvssinnað
**4)** møguleiki er fyri at framleiða orku úr vatni, tí rør longu liggja í lendinum frá støðini og niðan á Kirkjuvatn.

## Lýsing av verkætlanini

Endamálið við verkætlanini er at framleiða tara við neutralum $CO_2$ útlátið við at framleiða orku úr varandi keldum. Ætlanin er at seta vatnmyllu upp inni á tarastøðini í Fámjin, og framleiða orku við vatntøku úr Kirkjuvatni. Vatnleiðing liggur í lendinum frá tarastøðini (LA-01) og niðan á Kirkjuvatn (sí kápumynd). Vatninntakið er á 4m dýpið í vatninum og vatn verður ikki tikið beinleiðis úr ánni. Rørini, niðan á Kirkjuvatn, vóru løgd, tá smolt framleiðsla var á støðini í Fámjin, og fekst vatn varð nýtt í  framleiðsluni. Eitt tíðarskeið var eisini vatnmylla á gomlu smoltstøðini. Fámjins Kommuna eigur nú rørini, og vit hava gjørt avtalu við kommununa um at gagnnýta vatnið í rørunum. Ætlanin er at byrja orkuframleiðslu við vatnmylluni, á tarastøðini í Fámjin, skjótast til ber.

***Kirkjuvatn***

Kirkjuvatn er størsta vatn í Suðuroy, og er 0,2 km2 til víddar. Vatnið liggur í tveimum høgum í Fámjin, Rókhaga og Fjallinum Mikla.
Við grein í í Norðlýsinum 06.06.2021 (https://nordlysid.fo/tidindi/69874/eitt-gott-sil-ur-kirkjuvatni) kann staðfestast, at síl eru í Kirkjuvatni.

Í samrøðu við Niels M. Jacobsen, lívfrøðing, føddur, uppvaksin og búsitandi í Fámjin, greiður hann frá, at sílastovnurin á Kirkjuvatni er minkaður sera nógv síðan hann var drongur. Niels greiður eisini frá at sílastovnurin, á vatninum, ikki er upprunaligur. Abbi Niels hevur sagt honum, at menn bóru síl niðan á vøtnini, og at hetta helst varð gjørt fleiri ferðir og langt aftur í tíðina. Víðari greiður Niels frá, at tá hann var drongur fekk man bæði vanlig síl og bleikir, so allarhelst vóru ymisk sløg av sílum borin niðan.

Rasmussen (1981) lýsir Kirkjuvatn, sum eitt vatn, ið fløðir og fjarðar rættiliga nógv, alt eftir um tað er støðugt turrveður ella avfall. Ítøkilig vitan um natúrligu broytingina í vatnstøðuni er ikki tøk. Eisini er ein leki í vatninum nevndur (Rasmussen, 1981). Í turrveðri, tá vatnstøðan minkar, og einki vatn rennur yvir vatnstromina á Fossskarið, sæst ein frárenning (leki) uml. 7m niðri í ánni. Vatnstøðan lækkar tí óvanliga nógv tá turkur er. Vatn rennur aftur yvir vatnstromina tá nógv avfall er.

***Vatnmyllan***

Vatnmyllan, ið ætlanin er at seta upp, er av slagnum IREM. Veitari og ráðgevi er VatnOrka við Ólavi Poulsen. Vatnmyllan hevur neyva stýring. Sum vanligt er fyri IREM vatnmyllur, verður vatnrenslið minkað í seks stigum soleiðis at natúrliga vatnstøðan kann haldast í vatninum. Hetta er sjálvirkandi útgerð, og við einum følara ber til, neyvt, fylgja vatnstøðuni, í vatninum. Orkuframleiðslan verður tillaga ta natúrligu vatnstøðuna við at vit halda okkum innanfyri tey máldu vatnstøðusveiggjini. Tá lítið av vatni og turkur er, steðgar vatnmyllan við at framleiða.Vatnleiðingin, rør við diametri á 250mm, verður tann sama sum longu liggur í lendinum, og sum Fámjins Kommuna eigur. Mesta el-framleiðsla er 50kW.

## Umhvørvisárinsmeting og fyribyrging av árinum

Avgerandi fyri verkætlanina er, at orkuframleiðslan við vatni úr Kirkjuvatni ikki hevur neiliga ávirkan á umhvørvið. Ein fyritreyt fyri at meta um umhvørvisárin av virkseminum er, at umhvørvið er lýst á haldgóðan hátt innan virksemi byrjar.

Umhvørvisárin, ið verkætlanin kann hava, meta vit eru:

- at vatnstøðan í Kirkjuvatni minkar soleiðis, at flora og fauna í vatninum og kring vatnið, verða ávirkað.
- At sílayngul fer í vatninntakið.

Fyri at forða møguligum umhvørvisárinum verða (og eru) niðanfyri lýst tiltøk framd.

***Vatnstøða***

Trýstloggarar av slagnum RBR Solo (Mynd 1A) vóru settir út á vatnið í februar 2023 (Mynd 1B). Firum Pf. eigur trýstloggarnar, og avtala er gjørd við Firum um, at tey avlesa og greina loggaðu dáturnar. Ætlanin er at máta natúrligu trýstsveiggini, og harvið fáa eina fatan av vatnstøðuni og vatnstøðusveiggjunum í Kirkjuvatni, tá ongin vatntøka er.




**Mynd 1.** A) Trýstloggarir, B) Flot sæst á vatninum har loggarnir eru settir út.

Afturat trýstmátingunum taka vit myndir av Keldá (Mynd 2A) og áunum úr Fossskarði (Mynd 2B). Vit hava tikið myndir av hesum áum uml. einaferð um vikuna síðani mai 2023. Endamálið við myndunum er at skráseta, hvussu stórar áirnar, ið hava samband við Kirkjuvatn, eru tá ongin vatntøka er. Ætlanin er at halda fram at máta trýst og taka myndir, tá vatnmyllan er byrja at framleiða, soleiðis at vit tryggja at vit arbeiða innanfyri tey natúrligu vatnstøðusveiggini, og forða fyri at árin á livandi verur í og kring vatnið standast av okkara virksemi.




**Mynd 2.** A) Keldá, B) Fossskarð. Myndirnar eru tiknar í mai 2023.

***Vatninntak og sílayngul***

Fyri at verja sílastovnin á Kirkjuvatni, hevur tað stóran týdning, at sílayngulin ikki verður sogin inn í vatninntakið. Fyri at fyribyrgja hesum verður vatninntakið, í vatninum, sniðgivið á slíkan hátt, at ongin súgvieffekt verður. Nomatek veitir serfrøðina viðvíkjandi sniðgeving av vatninntakinum.

## Niðurstøða

Fyri at meta um møgulig umhvørvisárin, er neyðugt at kenna natúrligu umstøðurnar áðrenn virksemi, ið kann føra við sær møgulig árin, byrjar. Umhvørvisárin, ið ætlaða verkætlanin kann føra við sær, meta vit, eru at vatnstøðan í Kirkjuvatni kann broytast, og at sílayngulin endar í vatninntakinum. Undankanningar av vatnstøðuni hava verið í gongd síðan februar 2023 og ætlanin er at halda fram við kanningunum, tá vatnmyllan er byrja at framleiða, soleiðis at vit halda okkum innanfyri tað natúrliga vatnstøðusveiggið. Á hendan hátt tryggja vit, at árin ikki verða á livandi verur í og kring vatnið. Vatninntakið á Kirkjuvatni verður sniðgivið á slíkan hátt, at ongin súgvieffekt verður, og á hendan hátt tryggja vit at sílayngulin verður vardur frá møguligum árinum.

## Keldur

https://nordlysid.fo/tidindi
Øldir og upphav (1981). Jóannes Rasmussen. Emil Thomsen, Tórshavn.

## Heimildarfólk

Niels M. Jacobsen, Lívfrøðingur, Fámjin.